## Wright-Phillips aftur til City

Shaun Wright-Phillips er farin aftur til Manchester City í dag, eftir at hava verið til læknakanning. Hann kostar City umleið 85 milliónir krónur. Enski landsliðsleikarin hevur undirskrivað ein fýra ára sáttmála við Manchester City, har hann leikti í sjey ár frá 1998, til hann flutti til Chelsen fyri 210 milliónir krónur. - Eg eri ógvuliga fegin um at vera aftur í City, og eg gleði men at koma í gongd, sigur Shaun Wright-Phillips við The Times. Tíðin í Chelsea var ikki treytaleys success. Tey trý árini hann var í London byrjaði hann bert inni í 43 dystum. - Mær hevur altíð líkað hann væl sum leikara, og hann var eitt av mínum málum, tá eg kom til City, sigur venjarin, Mark Hughes, sum heldur, at tað er eitt kubb fyri Manchester City at hava fingið fatur á honum.



## City vann akkurát

Tað gekk akkurát, tá Manchester City í gjárkvøldið spældi móti danska FCM í UEFA-Cup kappingini. Púrasta óvæntað vann FCM dystin í Manchester fyri tveimum vikum síðani, og leingi var líkt til, at hetta var nóg mikið. Bara tveir minuttir undan leikloki kom vanlukkan tó, tá Danny Califf gjørdi sjálvmál, og so gjørdist neyðugt við bæði umdysti og brotsspørkum. Og í hesum seinasta var City-málverjin tann stinnasti, og so eydnaðist Manchester City at vin na á danska liðnum. Ein uppgáva, sum upprunaliga varð roknað sum ein formalitetur.



# Bestur í Europa

**Ikki heilt óvæntað varð Cristiano Ronaldo í gjár kosin sum besti spælarin í Europa í farna kappingarári**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Portugisiski gandakallurin hjá Manchester United hevur í ár vunnið tað, sum vinnast kann, um sæð verður burtur frá EM-heitinum, har Portugal heldur ikki slapp á pallin hesaferð.

Men við Manchester United hevur gingið betur. Premier League og Champions League endaðu við gulli, og í báðum kappingum varð Ronaldo besti málskjúttin. Tað gjørdi hann eisini til besta málskjúttan í Europa, og hetta fekk hann gyltan skógv fyri, eins og hann í Onglandi varð kosin besti spælari av bæði spælarasambandinum og av fjølmiðlunum.

Í gjár varð hann so eisini kosin besti áleyparin í Europa og besti spælarin í Europa.

Tríggir aðrir spælarar vórðu eisini heiðraðir, og komu hesir allir úr Chelsea. Petr Cech varð kosin besti málverji. John Terry ber nú heitið sum besti verjuspælarin í Europa og besti miðvallarin kemur eisini úr Chelsea. Hann eitur Frank Lampard.

*Eingin ivi er um, hvør var heitasta fótbóltsnavnið seinasta kappingarár. Cristiano Ronaldo hevur støðugt verið í fokus, og í gjár varð hann kosin sum besti spælarin í Europa*

## Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 31.08 | Víkingur-B36 | Eiler Rasmussen |
| 31.08 | NSÍ-ÍF | Petur Reinert |
| 31.08 | EB/S-B68 | Ransin N. Djurhuus |
| 31.08 | HB-B71 | Georg Rasmussen |
| 01.09 | Skála-KÍ | Lars Muller |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 30.08 | AB-TB | Birgir Sondum |
| 30.08 | HB-VB/S | Høgni Hansen |
| 30.08 | KÍ-Víkingur | Rói Jacobsen |
| 30.08 | B68-07 Vestur | Jón K. í Brekkuni |
| 30.08 | EB/S-NSÍ | Jan Skoradal |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 31.08 | Fram-B36 | Vinjard Dam |
| 31.08 | Víkingur-AB | Eugen Voda |
| 31.08 | ÍF-TB | Fríðin Ziskason |
| 31.08 | KÍ-Skála | Jákup M. Kjeld |
| 31.08 | MB-07 Vestur | Johan Petur Michelsen |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 31.08 | Víkingur-B36 | Sunniva Vesturtún |
| 31.08 | AB-KÍ | Pætur Albinus |
| 31.08 | Skála-VB/S | Kristian Petersen |

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 20 | 14 | - | 2 | - | 4 | 41 | 22 | 19 | 44 |
| 2 NSÍ | 20 | 10 | - | 4 | - | 6 | 30 | 24 | 6 | 34 |
| 3 HB | 20 | 9 | - | 6 | - | 5 | 38 | 16 | 22 | 33 |
| 4 B36 | 20 | 9 | - | 6 | - | 5 | 23 | 15 | 8 | 33 |
| 5 Víkingur | 20 | 9 | - | 5 | - | 6 | 33 | 23 | 10 | 32 |
| 6 B68 | 20 | 8 | - | 2 | - | 10 | 15 | 29 | -14 | 26 |
| 7 ÍF | 20 | 7 | - | 2 | - | 11 | 25 | 36 | -11 | 23 |
| 8 KÍ | 20 | 5 | - | 6 | - | 9 | 25 | 32 | -7 | 21 |
| 9 B71 | 20 | 5 | - | 3 | - | 12 | 22 | 35 | -13 | 18 |
| 10 Skála | 20 | 3 | - | 6 | - | 11 | 17 | 37 | -20 | 15 |

**Seinastu seks dystirnir**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 12 | 7 | 5 | 12 |
| 2 B36 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 7 | 4 | 3 | 12 |
| 3 B68 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 6 | 5 | 1 | 12 |
| 4 Víkingur | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 10 | 7 | 3 | 11 |
| 5 NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 8 | 7 | 1 | 10 |
| 6 HB | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 5 | 4 | 8 |
| 7 B71 | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 8 ÍF | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 7 | 11 | -4 | 6 |
| 9 KÍ | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 10 Skála | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 7 | 16 | -9 | 4 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 19 | 15 | - | 1 | - | 3 | 70 | 21 | 49 | 46 |
| 2 VB/S | 19 | 15 | - | 1 | - | 3 | 46 | 17 | 29 | 46 |
| 3 07 Vestur | 19 | 14 | - | 2 | - | 3 | 80 | 26 | 54 | 44 |
| 4 TB | 19 | 11 | - | 3 | - | 5 | 50 | 17 | 33 | 36 |
| 5 Víkingur | 19 | 7 | - | 3 | - | 9 | 25 | 45 | -20 | 24 |
| 6 NSÍ | 19 | 4 | - | 5 | - | 10 | 35 | 49 | -14 | 17 |
| 7 HB | 18 | 4 | - | 5 | - | 9 | 22 | 36 | -14 | 17 |
| 8 B68 | 19 | 4 | - | 3 | - | 12 | 29 | 49 | -20 | 15 |
| 9 KÍ | 18 | 4 | - | 2 | - | 12 | 21 | 60 | -39 | 14 |
| 10 EB/S | 19 | 3 | - | 1 | - | 15 | 14 | 72 | -58 | 10 |